Fiat Idea 1,4 16V Emotion:

# Heilt nýggjur mini-MPV frá Fiat



Fiat Idea er ein heilt nýggjur bilur í mini-MPV klassanum.

Mynd: Álvur Haraldsen

### Fiat Idea 1,4 16V Emotion

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,4 litur 4 syl. 16V bensin 95 hk |
| 0-100 km/t | 11,5 sek |
| Bensinnýtsla | 15,2 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 393,0 cm |
| Breidd | 169,8 cm |
| Hædd | 166,0 cm |
| Eginvekt | 1150 kg |
| Viðførisrúm | 320 / 1420 |
| Prísur | kr. 177.600,- |
| Søluumboð | Bilfríðkan<br>v. Velbastaðvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 317300<br>www.bilfridkan.fo |



Instrumentborðið er av nýggja stílinum við øllum instrumentunum saman í miðjuni

**Fiat Idea er ein heilt nýggjur bilur í skjótt vaksandi mini-MPV klassanum, seinastu árini er sølan av bilum í hesum klassanum fleirfaldað á evropeiska marknaðinum. Idea er ein fimm persónabilur við sera liðiligari innrætting**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Idea er ein bilur í klassa við t.d. Opel Meriva og Toyota Yaris Verso. Bilurin er bygdur yvir sama plattform sum Fiat Punto, men Idea er nakað størri og 18 cm hægri en Punto.

Idea fæst við tveimum ymiskum motorum, einum 1,4 litur bensin við 95 hk, og einum 1,3 litur Multijet dieselmotori við beinleiðis commonrail innspræning og 70 hk.

Bilurin er rúmligur innan, høgt til loftið og innrættingin er sera liðilig, við baksetrum sum kunnu flytast aftur og fram hvørt sær, og báðir stólaryggirnir á forsetrunum kunnu leggjast niður og brúkast sum borð. Við at flyta baksetrini kann støddin á viðførisrúminum broytast samstundis, sum beinplássið aftan eisini broytist.

Man situr høgt í Idea og útsýnið er gott. Instrumentborðið er av nýggja stílinum við øllum instrumentunum saman í miðjuni. Handskarúm eru oman á instrumentborðinum í báðum síðum, og girstongin situr væl fyri í instrumentborðinum.



*Idea er bygdur yvir sama plattform sum Fiat Punto, men hann er nakað størri og hægri*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eitt sereyðkenni fyri bilar í hesum klassanum, umframt tað at teir altíð eru lutfalsliga rúmligir, er, at nógvar hillar og smá rúm eru til at leggja lutir frá sær á. Idea hevur eisini rúm uppi undir loftinum .

### Active, Dynamic og Emotion

Bilurin fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur: Active, Dynamic og Emotion. Stórur partur av útgerðini er standard, bilurin hevur t.d. ABS bremsuskipan við EBD og seks airbag, rattið kann stillast allar vegir, servostýring við city-funktión sum ger at bilurin kann gerast lættari at stýra í t.d. býkoyring, fjarstýrt sentrallás, el-síðurútar, innbygt radio við fløguspælara.

Í Emotion útgávuni hevur hann t.d. 2-zone klimaanlegg, parkeringssensorar, radio at stilla í rattinum og 15" alu-felgur.

Koyrieginleikarnir eru sum flestu nútímans bilum - sera góðir og álítandi. Fjaðraskipanin virkar stútt og føst, og bilurin ber vektina væl.

Idea er ein bilur sum Fiat vænta sær nógv av. Hann kemur í beinharða kapping í einum klassa, har sølan av mini-MPV í Evropa er fleirfaldað á evropeiska marknaðinum seinastu árini. Prísirnir byrja við kr.158.600,- fyri ein 1,4 Dynamic.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

STARV Á HAGSTOVUNI

HAGSTOVAN HEVUR TØRV Á FÓLKI TIL FÓLKAHAGTØL, SERLIGA ÍBÚGVAHAGTØL, ARBEIÐSMARKNAÐARHAGTØL OG INNTØKUHAGTØL.

Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólki. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.

Besti førleiki er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og harafturat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.

Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

Vil tú hava meira at vita um starvið, set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800.

team85 tel 358000

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

ítróttur
Nr. 39 • hósdagur • 26. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyingar vunnu málríkan dyst

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð skoraði føroyska fótbóltslandsliðið fýra mál í einum altjóða dysti, tá ið teir á venjingarleguni í Spania vunnu 4-2 á liðnum hjá Allan Simonsen úr Luksembourg**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað gekk betur hjá føroyska fótbóltslandsliðnum í seinna dystinum á venjingarleguni í Cadiz í Spania. Eftir at hava tapt fyrra dystin 0-6 móti Pólandi, vunnu føroyingarnir 4-2 á Luksembourg, hóast teir vóru aftan fyri 0-1 í hálvleikinum.

### Nógv góð mál

Tað var, sum nevnt omanfyri, liðið hjá Allan Simonsen, ið koma á odda í dystinum týsdagin. Ein av leikarunum hjá Luksembourg rak við bóltinum í høgra borði, og sendi síðani eina avlevering inn fyri, og har kom ein av viðleikarunum hjá honum til og stútaði bóltin í netið uttan nakran møguleika hjá nýggja føroyska málverjanum, Bárði Johannesen, at verja fyri. Henda støðan helt sær til steðgin, hóast føroyingar eins væl kundu verið á odda, tí teir høvdu fleiri upplagdar málmøguleikar í fyrra hálvleiki.

Eftir steðgin kom vend í hjá føroyingunum, og ikki gekk long tíð, áðrenn hol kom á málskjótingina. Frísparksserfrøðingurin úr GÍ, Súni Olsen, skeyt, góðan minutt eftir steðgin, eitt gott fríspark móti málinum, og málverjin hjá Luksembourg, Alia Besic, megnaði ikki at halda harða skotinum frá gøtumanninum, og so var John Petersen beinan vegin á ripostinum og skeyt bóltin í málið til javnleik 1-1. Bert seks minuttir seinni var John aftur upp á spæl, eftir at føroyingar broderaðu seg ígjøgnum verjuna hjá Luksembourg, og hann legði Føroyar á odda 2-1.



*John Petersen skeyt tvey mál í 4-2 sigrinum á Luksembourg í Spania týsdagin. Við teimum báður málunum hevur John nú skotið átta mál í sínum 52 dystum á føroyska landsliðnum.*
*savnsmynd*

Besta málið í dystinum fingu føroyingar, tá ið eitt gott korter var eftir at leika. Føroyar fekk eitt fríspark einar 35 metrar frá málinum hjá Luksembourg. Sum ikki einaferð var Súni Olsen settur at skjóta, og hann gjørdi ikki mætari enn at langa bóltin upp í málhornið uttan nakran sum helst møguleika hjá málverjanum at fáa fatur á bóltinum. Ein sonn perla frætta vit úr Spania, og so var 3-1 til Føroyar. Liðið hjá Allani Simonsen royndi at koma inn aftur í dystinum, og tá ið okkurt um tíggju minuttir vóru eftir at leika, fingu teir minka um munin. Luksembourg fekk eitt hornaspark, ið var sent inn fyri, og tá ið bólturin kemur út frá, langar ein spælari til úr 20 metra fjarstøðu. Bólturin sat dygst úti við stólpan, men vælleikandi føroyski málverjin, Bárður Johannesen, var sum ein køttur niðri og fekk parerað skotinum. Tíverri fyri Bárð og føroyska liðið var tað tó ein leikari hjá Luksembourg, ið fekk fatur á returinum, og hann setti bóltin í málið til 3-2.

Luksembourg royndi nú at trýsta á fyri at fáa javnleik, men teir gjørdust tó ongantíð av álvara vandamiklir. Ístaðin vóru tað føroyingar, ið áttu síðsta málið í dystinum. Vanliga leiktíðin var farin, tá ið Andrew av Fløtum streyk avstað við bóltinum í høgra borði, hann sendi bóltin inn fyri og við handaru stong kom føðingardagsbarnið Julian Johnsson rennandi, og hann stútaði bóltin í málið til 4-2 til Føroyar. Hetta var samstundis fyrstu ferð nakrantíð, at føroyska fótbóltslandsliðið skeyt fýra mál í einum altjóða landsdysti!

### Óroynd verja

Føroyska manningin til dystin móti Luksembourg var henda: í málinum Bárður Johannesen úr HB, ið leikti sín fyrsta landsdyst. Í óroyndu verjuni vóru Súni Olsen í vinstru, Christian Høgni Jacobsen í høgru, og so teir báðir Johan Byrial Hansen og Atli Danielsen í miðverjuni. Á miðvøllinum leiktu Julian Johnsson, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen og Jákup á Borg. Í álopiinum vóru John Petersen og Christian Lamhauge Holst.

Í seinna hálvleiki gjørdi føroyska liðið fleiri útskiftingar. Símun Samuelsen, Hjalgrím Elttør, Hans Fróði Hansen og Andrew av Fløtum komu allir á vøllin eftir steðgin, meðan hinir tríggir eykamenninir, Johannis Joensen, Óli Hansen og Gunnar Nielsen ikki komu á vøllin. Óli Johannesen og Pól Thorsteinsson vóru íkki við orsaka av ávíkavist skaða og sjúku.

### Vælnøgdur landsliðsvenjari

Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, var væl nøgdur, tá vit fingu fatur á honum í telefonini úr Spania mikumorgunin. Henriki Larsen sigur, at hóast vit vóru aftan fyri við einum máli í hálvleikinum, so kundu vit eins væl verið á odda, tí vit høvdu fleiri upplagdar málmøguleikar fyri steðgin. Men tíbetur kom hol á í seinna hálvleiki, sigur hann.

Henrik Larsen sigur, at sum heild leikti alt liðið væl, og tað var stuttligt at síggja nógvir av teimum ungu spælarunum taka av, nú teir fingu møguleikan at royna seg, sigur hann.

Somuleiðis er landsliðsvenjarin sera væl nøgdur við debutantin í føroyska málinum, Bárð Johannsen, sum prógvaði at ein avloysari er tøkur, tá ið Jens Martin og Jákup ikki eru til at heita á. Henrik Larsen sigur, at Bárður stóð ein góðan dyst, og at hann óivað fær kjansin aftur seinni. Somuleiðis rósar venjarin unga Gunnar Nielsen úr Frem, ið gjørdi tað gott undir venjing tað stuttu tíð, hann var saman vi ð hópinum.

Føroyski landsliðsvenjarin, sum helt tapið móti Pólandi verða í meira lagi, sigur eisini, at venjingarstøði hjá hópinum kiundi verið betur, men tíverri eru tað nógvir, ið ikki hava vant í meiri enn ein lítlan mánað. Somuleiðis harmast venjarin um, at summir spælarar hava verið sjúkir og skaddir á venjingarleguni. Í dysitnum móti Luksembourg var liðskiparin, Óli Johannsen, ikki við, tí hann hevur fingið ein lítlan skaða í lærkrikanum, og Pól Thorsteinsson hevur alla venjingarleguna ligið við influensa. Somuleiðis hevur Johannis Joensen ein lítlan snudd í fótinum, og tí var hann spardur í dystinum týsdagin.

Um venjingarleguna sjálva sigur landsliðsvenjarin seg verða stak væl nøgdan, tí spælararnir hava víst góðan hugburð undir venjing, og tað hava verið nakrar góðar venjinar, ið hópurin hevur havt í Spania. Næsta uppgávan hjá føroyska landsliðnum verður so landsdysturin ímóti Hollandi í juni. Dysturin verður leiktur í Lausanne í Sveits, og Henrik Larsen vónar, at hann fær allar menn tøkar til tann dystin, ið hann metir sum eitt stórt upplivilsi hjá føroysku leikarunum. Føroyski hópurin kemur aftur til Føroyar í dag.